# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Til minnis um pápa mín Jónn Tórgið Hansen

### f. 3. sept. 1937 - ✞. 16. mars 2006



Tá eg seti meg niður at skriva nakrar reglur, renna minnini fram fyri meg. Tú tókst ímóti frelsuni ár 2002, og hesi fáu árini, eru tey ríkastu eg havi verið saman við tær. At tú komst at uppliva so nógv gott, hóast heilsan til seinast bilaði. Minnist væl, tá tú ikki orkaði so væl at ganga, tú segði, at tú ikki kundi fara á møti við skutara, tí so fóru øll at flenna.

Men tú var áhaldandi, tú gekk trúliga í kirkju og á møti hvønn sunnudag, og um tú ikki var, spurdu tey eftir tær, tí har átti tú ar vera. Tú sang eisini við Húsakorinum, men orkaði ikki so væl at syngja, so tað bleiv stutt tíð har.

Hvørja fer vit fóru suður á Blákross Caféina at syngja, var tú við; sum áhoyrari til seinast. Tú dámdi væl sang.

Bert eina viku áðrenn tú andaðist, segði eg við Vibeku, at nú mátti eg spyrja teg, hvønn sang tú ynskti til jarðarferðina. Hon bleiv so skakk; men eg segði, eg føldi á mær, at nú mátti eg spyrja, og tú svaraði glaður beinanvegin »Jesus um teg vil eg syngja«. Hesin var tín persónligi vitnisburður til møti, tá tú frítt kundi velja sang har. Og so ikki at gloyma »Niðan á heyggin« sum Tove og Jón sungu so væl til jarðarferðina.

Men Harrans vegir eru ikki okkara vegir, Gud vildi nakað annað við tær.

Tann morgunin tú andaðist stendur so klárur fyri mær. Eg kom oman um 7-tíðina um morgunin, alt var so stilt rundan um okkum. Sjúkrabilurin kom og tú bleiv borin út. Vit høvdu ikki fingið tosað við teg, tí tú orkaði ikki. Men komin út í túnið, sigur mamma við teg, síggj Sámal stendur í vindeyganum í barnagarðinum og vinkar til tín; tá hugdi tú upp og vinkaði til hann; hetta stendur so fæst í mínum minni, og Sámal var glaður um at abbi hevði vinkað farvæl.

Tú tosaði eisini við Halgerð gjøgnum Skype, nei ikki orkaði tú væl, men tað skal tú vita, at hon var glað, at hon fekk tosað við teg áðrenn.

Tú fórt stillisliga úr hesum heimi; uttan pínu, tað kunnu vit bert takka fyri.

*Nú syngur tú títt sigursljóð.*
*Eg minnir havi ring og góð*
*Ja, mangan baldrut lívið var,*
*Men tíbetur, broyttist lívið hjá tær.*
*Mamma fekk ein nýggjan mann,*
*tá tú Jesus fann.*
*Nú átti tú Hann í tínum hjarta*
*Og skínur nú sólin bjarta.*

Takk fyri alt tú vart fyri meg og mína familju. Vit síggjast.

Men Jesus má verða hjá tær góða mamma og míni systkin við familju. Jesus styrki okkum øll.

**Dóttir tín Joan**

## Minningarorð um skómakarin, Jákup Hansen

### 14 sept. 1915 - 19 feb. 2006



Eg vil her skriva nakrar reglur um abba mín, skómakarin við Gøtugjógv.

Á summri 1993 spurdi abbi meg, um eg ikki vildi taka yvir skógvahandilin, sum hann hevði rikið síðani í 1947. Hetta var í sonevndu kreppuárunum, og eg var júst blivin arbeiðsleysur. Systir mýn Marilyn hevði tá passa handilin í nøkur ár. Hon hevði planir um at fara til Danmarkar í skúla. So abbi segði, at um eg ikki vildi taka yvir, so var hann helst noyddur at snara um í handlinum.

Eg helt ikki, at hetta var nakað eg kundi vera góður til, helt meg ikki duga so væl at fáast við fólk. Eg hevði jú sæð hvussu væl hann dugdi at fáast við viðskiftafólkini. Men eg helt, at synd var at stongja handilin, serliga so leingi abbi orkaði at sita á verkstaðnum og umvæla skógvar. So eg startaði við blandaðum kenslum, men abbi dugdi væl at geva góð ráð. Í feb. 2005 flutti eg so handilin norð í barnaheimi hjá mær. Hetta tí at gamli handilin var vorðin alt ov lítil.

Tá eg avgjørdi at flyta handilin, var abbi sera spentur mína vegna. Hann mundi verða glaður um, at so steðgaði handilin ikki upp fyribils. Men tann dagin klárt var at flyta, og vit byrjaðu at tøma gamla handilin, sá eg tíðuliga á honum, hvussu rørdur hann gjørdist. Hann hevði jú haft handilin í kjallarinum í næstan 60 ár. Tað gleddi meg nógv, tá abbi kom at sýna handilin stutt eftir eg hevði opnað. Hann var sera væl nøgdur við betraðu umstøðunum hjá handlinum.

Tað, at eg havi arbeitt í skógvahandlinum í 12 ár saman við abba, sum hvønn dag sat á verkstaðnum, gevur nógv minnir, nú hann er farin. Serliga vil eg minnast, hvussu hann hvønn dag hann var einsamallur á verkstaðnum, altíð sang sangir, sum vøru honum kærir. Sangir sum "Eg velji fyrr Jesus" og "Niðan á heyggin" hoyrdi eg hann mangan syngja. Tá eg hoyrdi hann syngja, steðgaði eg mangan á at lurta. At sangurin kom frá hjartanum hoyrdist tíðiliga.

Abbi hevði eitt sera stórt hjarta. Hevði altíð umsorgan fyri ørðum menniskjum, og vildi hjálpa har hann kundi. T.d. hevur hann koyrt nógvar trúboðarar runt landið, bæði føroyingar og útlendingar. Eg fái nógv dømi fortald av fólki, sum minnast hvussu tað var nakað serligt hjá teimum, at koma at keypa skógvar frá abba. Tey siga frá, at hann gav teimum pening fyri bensin, um tey høvdu koyrt langt, bara fyri at keypa skógvar. Og hevði familjan nógv børn, ja so var mangan givin fittur avsláttur. Eg upplivdi eisini mangan, at tá ein einkja kom at umvæla skógvar, ja so kostaði tað onki tá skógvurin var umvældur. Spurdi eg, so hví umvælingin onki kostaði, segði hann, at tað var tí, at hann hevði ikki hjarta til at taka pening frá teimum, ið hann metti ikki høvdu so nógv. Abbi elskaði Harran, og tí elskaði hann eisini síni medmenniskju.

Bæði í samkomuni og millum manna, var abbi kendur sum tann umsorgsfulli, blíði og gávumildi skómakarin.

Abbi byrjaði at læra til skómakara í 1933. Byrjaði síðani sjálvur í ´37 og at handla við skóm tíggju ár seinni. Hann umvældi skógvar til summari í 2005. Tá var hann óheppin at detta og bróta høgru mjødn. Eftir hetta kom hann ongantíð heilt fyri seg aftur. Tó, mótið var altíð gott og dugdi hann eisini at skemta. Hann plagdi at siga tað, sum ein lækni hevði sagt við seg: At um hann ikki altíð hevði tað so gott, tað skuldi hann ikki leggja so nógv í, tí statistikkurin segði, at sera fá doyðu í so høgum aldri, sum hann nú var í.

Stórur saknur er nú ikki at síggja abba sita á verkstaðnum meir. Hvørjaferð eg koyri niðan til Gøtugjógv, og síggji at eingin abbi situr á verkstaðnum ella í stovuvindeyganum, følist tað sera tømt. Tí hann var altíð har. Men hann er ikki fluttur heimanífra – hann er fluttur heim. Og tað gleddi hann seg til. Hann segði mær einaferð eftir ein blóðpropp, har hann var burtur eina løtu, at hann føldi eina óforkláriliga hvíld, og sá eitt sterkt ljós sum hann ikki hevði sæð áður. Og so gleði eg meg at hitta ommu tína aftur, segði hann við meg.

Eg havi ein son sum er 6 ár. Og eins og tá eg var barn, dámdi honum sera væl at koma á verkstaðið, tá langabbi var har. At langabbin var góður við seg, hevði hann lagt til merkis. Fyri nøkrum vikum síðani, hoyrdi kona mín, Anja, at Áron lá og græt einsamallur í stovuni. Tá hevði hann funni eina mynd av langabba, og fór at leingjast eftir honum. Ja sjálvt hjá teimum minstu er saknurin stórur.

Nógv kenna søguna, um vinarlagið millum abba og russarar. Tá russiskir trolarar komu á Skála til umvælingar, var abbi mangan har við traktatum og bíblium. Eisini koyrdi hann teir runt um í Føroyum, at keypa bilar og bildeilir, sum teir so tóku við til Russlands. Í hesum sambandi kom abbi at kenna Klaru. Tey giftust síðani, og var tað ein góð heimahjálp, plagdi abbi at siga. Klara skal hava takk fyri, serliga seinastu árini, har hon tók sær av abba, tá hann til tíðir var sjúkur.

At tað bert skuldi ganga tríggir mánaðir, frá tí at abbi fór heim til Harran, og til at Anna, dóttir abba og fastur mín, eisini fór heim, er svárt hjá okkum nærmastu. Vit vóru øll so góð við tey, og tey góð við hvønn annan. Anna og Aksel búðu 25 ár saman á Skipanesi, og var hann henni ein hollur stuðul, tí tey flestu vita, at heilsan hjá Annu heilt frá ungum árum ikki var so góð. Anna var altíð so áhuga í børnunum hjá beiggjunum hjá sær, og ikki minst børnunum hon gjørdist abbadidd hjá. Hon mintist allar føðingardagarnar í høvdinum, og keypti teimum gávur. Og tá vit endaðu eina telefonsamrøðu, lat hon hvørjaferð heilsa børnunum.

Undurfult er at vita, at vit skullu møta teimum í nýggjum, dýrdargjørdum og himmalskum likami.

Eg vil hervið lýsa frið yvir minni um abba mín og Annu fastur.

**Terje**

Heri Tróndheim, Argir:

## 40 ára starvsdag á Skúlanum á Trøðni

*Jan Christiansen, skúlastjóri, handar Hera Tróndheim ein málning frá stovninum*



Mynd: Jens Kristan Vang

Hósdagin 1. juni var lítið hátíðarhald á Skúlanum á Trøðni í Havn í sambandi við at Heri Tróndheim hevði 40 ára starvsdag sum lærari á stovninum. Skúlastjórin, Jan Christiansen, segði nøkur orð, og handaði honum ein vatnlitsmálning og blómur frá skúlanum.

Heri er 64 ára gamal og leirvíkingur. Hann tók lærarapróvgv á Føroya Læraraskúla í 1964. Eftir tað var hann skúlalærari í Leirvík til 1966, tá hann fekk starv á Føroya Spesialskúla.

Spesialskúlin var tá við Skansavegin. Fyrst í 70-unum húsaðist skúlin í trimum ymiskum støðum í býnum til 1976, tá flutt varð í nýggjan skúla, Skúlan á Trøðni.

Heri var á ársskeiði í Danmark í 1966/67, har hann fekk sær útbúgving í at undirvísa blindum, men í sínum starvi hevur hann mest undirvíst hálvvaksnum, sum hava innlæringstrupulleikar.

Í 1979/80 var hann á ársskeiði á Fróðskaparsetrinum í føroyskum og norðurlendskum máli fyri lærarar og tók exam-art próvgv í føroyskum og norðurlendskum máli og bókmentum í 1984. Frá 1993-94 stóð hann fyri blindastovninum.

Heri er virkin innan Heimamissiónina í Føroyum og var formaður frá 1994-98. Í meira enn 30 ár hevur hann verið urguleikari í Argja kirkju. Hann sat í bygdaráðnum á Argjum frá 1988-96, tey seinastu tvey árini sum formaður.

Annars hevur Heri sum frítíðarítriv at ganga fjalltúrar, sum hann ger hvørja viku, at flota við bátinum "Haghamri" og røkta urtagarðin.

Foreldrini hjá Hera vóru: Maria, f. Samuelsen, úr Leirvík, og Jóhan Jákup Tróndheim, ættaður úr Norðragøtu.

Heri er giftur Rigmor, f. Hansen, av Argjum. Tey eiga børnini: Jónheðin, sum býr á Argjum, Oddur, sum býr í Sørvad (DK), Vónbjørt, sum býr í Havn, og tvíburarnar Maritu, um býr í Brønderslev (DK) og Jens Michal, sum býr í Havn. Barnabørnini eru seks í tali, ein abbasonur og fimm abbadøtur.